Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 391,
P/f Demmus, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
10.01.1996

Nýtt navn:
Sp/f Demmus

Kapitalur: Hækking við kr. 70.000,00 til kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 70.000,00 við grunshækking til kurs 100

Nevnd: Farin úr nevndini: Hedvig Sofía Svensson, 100 Tórshavn (formaður), Kári Svensson, Marknagilsvegur, 100 Tórshavn og Jóhan Svensson, Miðrás 5, 100 Tórshavn.

Stjórn: Farin frá sum stjóri: Hedvig Sofía Svensson, 100 Tórshavn.
Innkomnir sum stjórar: Johan Svensson, Miðrás 5, 100 Tórshavn og Kári Svensson, Marknagilsvegur, 100 Tórshavn.

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær ella í felag.

Skráseting Føroya
tann 12. juni 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 1194,
P/f Ísborg, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
25.03.1996

Kapitalur:
Hækking við kr. 5.150.000,00 til kr. 5.650.000,00.
Inngjaldingarháttur: Kr. 5.150.000,00 við skuldarumskifti.

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.

Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 11. juni 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 1988,
P/f Grafik Studio, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
20.11.1995

Nýtt navn: Sp/f Grafik Studio

Kapitalur: Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 110.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100

Nevnd: Farin úr nevndini: Jan Jacobsen, Smærugøta 21, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Jacob Sverre Joensen, Hvítanesvegur 1, 188 Hoyvík.

Stjórn: Innkomin sum stjóri: Ingi Joensen, Krosslið 11, 100 Tórshavn.

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift stjórans í øllum viðurskiftum.

Endamál: Endamál felagsins er at reka tænastuvinnu innan grafik, video og filmsframleiðslu og virksemi, sum natúrliga hoyrir hesum til.

Skráseting Føroya
tann 12. juni 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 1236,
P/f Alilaks, 530 Fuglafjørður.

Viðtøkur broyttar:
13.02.1996

Nevnd:
Farin úr nevndini: Martha Simonsen, 530 Fuglafjørður.
Innkomin í nevndina: Arnhold Sigurðsson Simonsen, 530 Fuglafjørður.

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.

Skráseting Føroya
tann 11. juni 1996

Kristin Balle

TOTO mátti avlýsa

Tað er ikki ofta at tey stóru nøvnini, sum TOTO koma til Føroyar. Kortini vóru fyrireikaririnir noyddir at avlýsa eykakonsertina, sum skuldi vera í gjár.

TOTO, frá vinstru: Steve Lukather, Mike Porcaro, David Paich og Simon Phillips. Á konsertuni í kvøld vera tveir sangarir aftrat teimum fýra ið vanliga manna TOTO

Tað er ikki so ofta, at tey stóru nøvnini koma til Føroya at hava konsertir. Tó noyddist heimskendi rockbólkurin TOTO, ið kom til Føroya í fyrradagin, at avlýsa eykakonsertina í gjár, vegna vantandi undirtøku.

TOTO hevur 20 ára jubilæum í ár, og er á turné, í samband við hetta. Teir hava so at siga verið á toppinum øll árini.

Eftir at hava spælt í Føroyum gongur leiðin til Luxemburg.

Fólk heintaðu ikki atgongumerkini

Bert tryggjar dagar eftir, at tað var greitt, at TOTO skuldi koma til Føroyar, vóru øll atgongumerkini til konsertina útseld, og hetta áðrenn at teir yvirhøvur høvdu lýst við konsertini.

Tískil varð ein eykakonsert fyriskipað, men tá avtornaði vóru so fá ið heintaðu atgongumerkini, at konsertirnar eru lagdar saman.

Fyrireikarirnir halda ikki, at tað sømir seg at lata bólkin spæla fyri bert trífýrahundrað fólkum. So er bert at vóna, at teir møta lagaligheit, tá tað kemur til leigu av høllini og øllum øðrum útreiðslum, ið eru í samband við, at teir hava verið noyddir at avlýsa eykakonsertina.

Var manningin í TOTO skuffað?

-Teir høvdu væntað tvey job, men teir hava fingið at vita at konsertirnar eru lagdar saman fyri teirra skyld.

-Eg vil siga at vit eru sera skuffaðir tá so nógv fólk leggja atgongumerkir av, og síðan ikki heinta tey.

Tað verða 1600 fólk á konsertini í kvøld, og fyrireikararnir væntar, at tað ferð at ganga uttan undirskot. TOTO tekur millum 45 og 150 túsund dollarar fyri bert undirhaldið. Hvat teir taka fyri akkurát hesa konsertina vilja fyrireikararnir ikki siga, men við øllum útreiðslum kann tað nemt verða ein dýr søga.

md

Føroysk list í Neystinum

Í sambandi við føroyska mentanardagin í Ishøj á jóansøku verður listaframsýning nevnd UNG FÆRØSK KUNST í felagshúsinum hjá Róðrarfelagum »NEYSTIÐ« tann 23. juni frá kl. 13–20.

Summir av framsýnarunum eru útbúgvin listafólk, hini hava útbúgving, ið nemur við listaøkið: arkitektar, designarar o.a. Øll, ið luttaka í framsýningini, eru føroyingar, sum búgva í Danmark.

Hesi hava játtað at luttaka: Armgarð Weihe, Barbara í Gongini, Turið Mohr, Eir í Ólavsstovu, Anna Katrina Højgaard, Asgerð Asgeirsdóttir, Anker Eli Petersen, Osbjørn Jacobsen, Michael Widerøe, Anni Arge, Vígdis Petersen, Jógvan Biskupsstøð og Bárður Oskarsson.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 2258,
P/f Luna, 510 Gøta.

Viðtøkur broyttar:
01.03.1996

Nevnd:
Innkomin sum næstformaður: Salomon Olivar Gregersen, 513 Syðrugøta.

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift av tveimum nevndarlimum saman ella av einum stjóra saman við einum nevndarlimi.

Skráseting Føroya
tann 11. juni 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/f 362,
P/f Mogens Petersen-bilverkstaður, 800 Tvøroyri.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Mogens Petersen, 800 Tvøroyri.
Innkomin sum formaður: Liljan Petersen, 800 Tvøroyri
Farin úr nevndini: Gudmund Frederik Poulsen, 800 Tvøroyri.

Nýtt roknskaparár:
01.01.–31.12.

Umleggingarár:
01.12.–31.12.

Skráseting Føroya
tann 11. juni 1996

Kristin Balle

Eyðkvæmislinjan
svarar alt samdøgrið á tlf. 18820.
Mikudagar kl. 19.00–21.00 fæst persónlig ráðgeving og serligir spurningar verða svaraðir.